# Vinnuhúsið undrast yvir borgarstjóran

Vinnuhúsið undrast yvir, at Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, ikki heldur føroyskar fyritøkur vera førar fyri at gera eina heila ítróttarhøll. Í viðmerking til málið sigur Vinnuhúsið á heimasíðu sínari, at Heðin Mortensen eigur at greiða frá, hví hann hevur hesa áskoðan. Víst verður til grein í Sosialinum, har borgarstjórin er endurgivin fyri at siga, at ongar føroyskar fyritøkur kunnu gera eina heila ítróttarhøll sum hana á Hálsi. Men hann metir tó, at onki er í vegin fyri, at føroysk arbeiðsmegi verður nýtt í arbeiðinum. Vinnuhúsið undrast yvir hesa áskoðan hjá borgarstjóranum og biður nú um eina frágreiðing.



# Vilja hava meiri tosk

Býráðið á Ísafirði í Íslandi vil hava fiskimálaráðharran at geva flotanum loyvi til at veiða meiri tosk enn ta ásettu kvotuna. Í einum uppskoti, sum býráðið hevur samtykt, stendur, at sambært teimum seinastu kanningunum er toskastovnurin so mikið væl fyri, at tað ber væl til at lata flotan fiska minst 50.000 tons av toski afturat teirri ásettu kvotuni í ár. Býráðið á Ísafirði heldur, at kreppan í íslendska búskapinum eigur at eggja fiskimálaráðharranum til at ganga áheitanini á møti.

# av lógarforðingum



*– Verður loyvt hjá føroyskum heilsølum at selja drykkivørur við alkoholi til skeinkiloyvishavarar, og sleppa vit at lýsa við øllum, sum vit bjóða fólki, fáa vit eina betri og sterkari matstovuvinnu, sigur Jóhannes Jensen, matstovu- og hotelstjóri*

*Mynd: Martin Sirkorvsky©*

Landsins – ið tekur sær av øllum innflutningi av drykkivørum við alkoholi. Ja, í veruleikanum er tað ein persónur, nevniliga innkeypsleiðarin í Rúsuni, ið hevur ábyrgdina av, at kræsnir føroyskir gómar sleppa at smakka tað vín, sum er best fyri teir. Hetta er ein alt ov stór ábyrgd at lata einum persóni, heldur Jóhannes Jensen.

– Eg ivist ikki í, at tey í Rúsuni royna at gera sítt besta, men alheims ví±n-marknaðurin er risastórur, og tað vildi tí verið ógvuliga natúrligt, um vit í vinnuni høvdu lættari atgongd til vørurnar, eins og eitt sindur av kapping heilt sikkurt hevði havt við sær, at vit fingu bæði betri og bíligari drykkivørur, sigur matstovu- og hotelstjórin.

Hann mælir tí til eina lógarbroyting, sum loyvir føroysku heilsølunum at innflyta rúsdrekka til føroyskar skeinkiloyvishavarar.

– Rúsan skal framvegis taka sær av innflutningi og sølu til vanliga borgaran, meðan heilsølurnar skulu sleppa at bjóða matstovum og øðrum við skeinkiloyvi vørur, eins og tá talan t.d. er um tær rávørur, sum vit brúka í framleiðsluni hjá okkum, sigur Jóhannes Jensen.

Tað er neyðugt at hava virðing fyri rúsandi løgi, men tá tað er sagt, so er vín, øl og spiritus eftirhondini ein so útbreiddur og vanligur partur av matstovuvinnuni, at eitt monopol á innflutningssøkinum svarar til, at ein almenn fyritøka var tann einasta, sum slapp at innflyta eplir.

### Drykkivørur ein lítil helvt

At drykkivørurnar eru ein fíggjarliga týdningarmikil partur av virkseminum hjá teimum, ið fáast við at reka matstovu, tala tølini fyri. Jóhannes Jensen sigur, at tað ikki er óvanligt í øðrum londum, at helvtin av umsetninginum hjá eini matstovu, kemur frá víni og øðrum drykkivørum. Í Føroyum er eitt sindur ymisk, hvussu lutfallið er, men tær royndir, sum tey í Hotel Føroyar samtakinum hava gjørt sær, vísa at 40 prosent at inntøkunum á matstovum teirra, koma frá drykkivørum.

– Tí er tað sera umráðandi, at vit sleppa at bjóða okkara kundum tað besta og mest fjølbroytta, og tað gera vit ikki, so leingi, sum ein einstøk almenn fyritøka hevur einkarætt til søluna, sigur Jóhannes Jensen.

### Lýsa við helvtini av vøruni

Sum er, ber ikki til lýsa við nøkrum, sum hevur eitt innihald av alkoholi, ið er yvir eitt prosent ella har á leið. Sjálvt um hugflogið er stórt, og orð sum "biiib" verða brúkt, har tað skal standa øl, vín ella eitt nú whiskey, so er tað als ikki loyvt at lýsa við rúsandi løgi. At myndugleikarnir taka lógini í størsta álvara, er millum annað staðfest fyri ikki so langari tíð síðani, tá Hotel Føroyar saman við øðrum varð dømt í einum máli um eitt tiltak, har drykkivørurnar høvdu ein stóran leiklut.

So seint sum í farnu viku sást ein lýsing frá einari fyritøku, sum skipar fyri skeiðum og ráðstevnum, har orðið "biiip-smakking" bleiv nevnt, eftir at skrivað varð, at m.a. bispur skuldi hava eitt innlegg.

Jóhannes Jensen vísir á, at matstovurnar ofta hava bæði matskrá og vínskrá, og at tað seinnu árini er tað vorðið rættiliga vælumtókt at keypa sær eina samlaða menu, har matstovan setir saman mat og vín.

– Tá hava vit eina støðu, har vínið er ein partur av upplivingini, men vit sleppa ikki alment at siga fólki, hvat tað er fyri ein vøra, vit vilja bjóða teimum, vísir Jóhannes Jensen á.

Aftur her ber til at samanbera við onnur handilslig viðurskifti, og svarar tað til, at ein bilsøla bert slapp at lýsa við felgum og ikki dekkum.

Jóhannes Jensen veit, at lýsingar og alkohol krevja, at mann er varðin, men hann metir, at forboðið fyri at lýsa við drykkivørum er búgvið til at verða endurskoðað.

– Tað kann gott vera, at vit eiga at upplýsa um vandan fyri ovurnýtslu av alkoholi í sambandi við slíkar lýsingar - ein lítil tekstur skuldi kanska fylgt við slíkari lýsing, eins og vit síggja á sigarettpakkum – men vandin fyri misbrúki hjá nøkrum heilt fáum, eigur ikki at forða okkum í at koma víðari, sigur Jóhannes Jensen og vísir á, at yngri ættarlið hava eitt meira natúrligt samband við mat og drykkivørur, og at tað ikki er forboð omaná forboð, sum er orsøkin til tað.

# íløga

taka sær av hesi kunning ella marknaðarføring, at taka sær av, sigur Jóhannes Jensen.

Og nú vit eru við kunning og almenn feløg, so vísir hotelstjórin á, at tað ikki er nóg mikið hjá tí almenna at fara til Brússel við nøkrum tónleikabólkum.

- Eitt tiltak við føroyskum tónleikabólkum í Brússel, er ikki eitt tiltak, sum marknaðarførir Føroyar sum ferðamál, men harafturímóti eitt tiltak, sum marknaðarførir føroyskan tónleik, vísir hann á.

Tað rætta vildi í hesum føri verið, at eitt felag, sum fekst við tónleikavirksemi, fekk stuðul til sítt arbeiði.

- Ja, nú sigi eg stuðul, men aftur her kundi eg brúkt orðið íløgu, tí 10 milliónir krónur til marknaðarføring av øllum møguligum, sum hevur við Føroyar at gera, er sum sagt ikki ein stuðul, men ein íløga, sum vit fáa fleiri ferðir aftur, sigur Jóhannes Jensen.



*– Ferðafólk vilja gjarna uppliva ráu natúrina í Føroyum, men tey vilja eisini hava altjóða valmøguleikar, tá tey til dømis skulu keypa sær eina øl. Tí skal tað almenna betala fyri at gera Føroyar kendar, og so kunnu vit taka okkum av at selja ferðafólki og øðrum 1.floks vørur, sigur hotelstjóri.*

*Tilvildarlig mynd: Leif Láadal*